**ISBN 99918-971-5-1**

# Kommunusamanlegging - hvat siga suðringar?

Dennis Holm og Bjarni Mortensen

## ARBEIÐSRIT NR. 7/2004

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

## Innihaldsyvirlit

Kommunusamanlegging – hvat siga suðringar? ..... 3
Frá 8 til 51 kommunur ..... 3
Kommununevndin og tvungin kommunusamanlegging ..... 4
Sjálvbodna kommunusamanlegging ..... 5
Glið komið á kommunusamanleggingar ..... 5
Kommunurnar í Suðuroynni ..... 7
Fólkatal, aldurs- og kynsbýtið ..... 8
Skattskyldug inntøka og kommunuskuld ..... 9
Kommunusamanlegging í Suðuroynni ..... 10
Hvat halda suðringar um kommunusamanlegging? ..... 12
Ja til kommunusamanlegging ..... 12
Meiriluti í øllum kommununum ..... 13
Flest ynskja 1. kommunu í Suðuroy ..... 13
Kommunur skulu leggjast saman skjótast tilber ..... 14
Kommunala fyrisitingin í Hovi? ..... 15
Stórar vónir til kommunusamanlegging ..... 16
Hví eru fólk ímóti kommunusamanlegging? ..... 18
Hvat vænta tey? ..... 20
Ynskja økt samstarv ..... 20
Status quo, kommunusamanlegging ella økt samstarv? ..... 21
Bókmentir ..... 23
Fylgiskjal 1. Fólkatal, aldurs og kynsbýtið í Suðuroynni 2002 ..... 24
Fylgiskjal 2. Skattskyldug inntøka í kommununum í 2001 ..... 25
Fylgiskjal 3. Spurnarblað ..... 26

## Kommunusamanlegging – hvat siga suðringar?[1]

Seinastu árini er kjakið um kommunusamanlegging vorðið ein alsamt størri partur av politiska kjakinum, hvat innlendis politikki í Føroyum viðvíkur. Kjakið hevur serliga snúð seg um, at kommunalu eindirnar eru ov smáar at umsita tey økini, sum kommunurnar sambært lóg skulu umsita í dag. – Og ikki minst tey størru og meiri umfatandi økini sum kommunurnar væntandi koma at umsita í komandi árum. Lagt hevur verið upp til, at kommunalu eindirnar gerast størri – og talið av kommunum sostatt fækkar.

Tað er upp til tað einstøku kommunustýri at avgera um teirra kommuna skal leggjast saman við eina aðra kommunu. Men tað er vorðið siðvenja, at kommunustýrini ikki taka hesa avgerð uttan at hava spurt borgararnar um hvat teir halda. Hetta arbeiðsritið er ein viðgerð av einari spurnarkanning um, hvat suðringar halda um kommunusamanlegging.

### *Frá 8 til 51 kommunur*

Í 1872 blivu Føroyar býttar upp í 8 kommunur (Lov om de færøske landkommuners styrelse 1872). Men við menningini av fiskivinnuni og samfelagnum sum heild, síðst í 1800'talinum og fyrst í 1900'talinum, vaks tørvurin á nógvum ymiskum íløgum og umsiting av lokalum viðurskiftum. Samstundis vildu nógvar bygdir gerast sjálvstøðugur kommunur, m.a. orsaka av at einstøku bygdirnar ikki vildu verða við í fíggingini av íløgum í t.d. vegir og havnaløg á øðrum plássunum, sum tey ikki fingu beinleiðis fyrimun av. Úrslitið var at nógvar bygdir valdu at gerast sjálvsstøðugar kommunur. Harvið vaks talið av kommunum, soleiðis at talið í 1967, tá Nes og Runavíkar kommunur gjørdist sjálvstøðugar kommunur, var komið uppá 51 kommunur. Í stóran mun var støðan tá tann, at hvør bygd var ein kommuna, hóast undantøk vóru.

Eftir at Nes og Runavíkar kommunur fóru hvør til sítt, gjørdi Løgtingið av, at nýggj kommunulóg skuldi gerast. Nýggja lógin, sum kom í 1972, forðaði fyri at kommunur kundu fara sundur. Harumframt legði lógin eisini upp til, at kommunalu eindirnar

[1] Ein partur av hesari grein er prentað í Lions Blaðið 2003, sum Lions Club Suðuroy gav út í Des. 2003.

skuldu gerast størri (Holm og Mortensen, Forthcoming 2004). Lítið hendi tó á hesum økinum í komandi árum, hóast nakrar av smærri kommununum kring Havnina løgdu saman við Tórshavnar kommunu, eins og Argja kommuna í 1997 fór uppí Tórshavnar kommunu.

### *Kommununevndin og tvungin kommunusamanlegging*

Í kjalarvørrinum á kreppuni fyrst í 1990unum varð spurningurin um kommunalu skipanina aftur settur ovarliga á politisku dagsskránna. Eitt úrslit av hesum var, at nevndir blivu settar at kanna kommunalu skipanina og gera uppskot um nýggja skipan. Í 1997 og 1998 lat sokallaða Kommununevndin úr hondum álit í 3 bindum um kommunuviðurskifti í Føroyum, har eisini varð gjørt uppskot um nýggja kommunala skipan.

Kommununevndin legði dent á, at tað skuldi gerast eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Harumframt mælti Kommununevndim eisini til, at kommunurnar skuldu fáa eitt skoðbrá til sjálvboðið at leggja saman, soleiðis at tað blivu 7 ella 9 kommunalar eindir. Viðvíkjandi Suðuroynni, varð talan um at kommunurnar skuldu leggjast saman í 1 ella 2 kommunur. Um kommunurnar ikki sjálvbodnar løgdu saman, mælti Kommununevndin til, at kommunurnar skuldu leggjast saman við lóg (Kommununevndin, 1998: 16, 25-28).

Tilmælið um tvungna kommunusamanlegging fekk kalda móttøku bæði frá kommununum og í Løgtinginum. Ein veljarakanning, sum Fynd gjørdi í 1999 (Fynd, 1999), vísti somuleiðis, at undirtøka var ikki millum fólkið fyri at talið av kommunum skuldi minkast niður í 7 – 9 kommunur. Kanningin vísti tó eisini, at stórir munir vóru á, hvat fólk kring landið tá hildu. Undirtøkan fyri kommunusamanlegging var størst í Havn, meðan hon var munandi minni kring landið. Tey flestu av fólkunum í kommunum, sum høvdu færri enn 2000 íbúgvar, vildu varðveita kommunalu skipanina sum hon var, tvs. við 49 kommunum. Hinvegin vísti kanningin eisini, at tað hóast alt vóru nógv, sum ynsktu broytingar.

### *Sjálvbodna kommunusamanlegging*

Stóra mótstøðan ímóti tvungnari kommunusamanlegging førdi eisini við sær, at Løgtingið í 2001 viðtók eina lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. Umframt at staðfesta, at kommunusamanleggingar skulu verða sjálvbodnar, so tilskilar hendan lóg, hvussu farast skal fram, um kommunur ynskja at leggja saman (Lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. 2001). Í lógini er eisini ásett hvørji krøv skulu verða lokin, áðrenn ein samanlegging kann gjøgnumførast, t.d. viðvíkjandi hvar kommunala umsitingin skal verða í teirri nýggju samanløgdu kommununi.

Landsmyndugleikarnir hava hervið gjørt greitt, at kommunusamanleggingar í Føroyum skulu verða sjálvbodnar, men tað er eisini ætlanin, at fleiri størri umsitingarlig øki verða flutt frá landsmyndugleikunum til kommunurnar at umsita í næstu framtíð, t.d. eldraøkið og barnaforsorgin[2]. Hetta merkir, at krøvini til kommunalu umsitingarnar gerast størri – og við hesum verður serliga lagt trýst á smærri kommurnar, sum væntandi fáa trupult við at umsita tær uppgávur, sum landið áleggur teimum.

### *Glið komið á kommunusamanleggingar*

Ætlaninar hjá landsmyndugleikunum um at flyta fleiri uppgávur til kommunurnar at umsita, hava ført við sær, at nógvar kommunur hava tikið uppaftur kjakið um kommunusamanlegging. Seinastu árini – serliga eftir kommunuvalið í 2000 – tykist hugburðurin viðvíkjandi kommunusamanlegging av álvara at vera broyttur. Og rættligt glið er komið á sjálvbodnar kommunusamanleggingar kring landið.

Síðan 1999 hava fólkaatkvøður verið í heili 11 kommunum. Tann fyrsta var tá kollfirðingar í 1999 samtyktu, at Kollafjarðar kommuna skuldi legði saman við Tórshavnar kommunu.

---

[2] Hetta var í øllum førum ætlanin hjá samgonguni millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin (Apr. 1998 - Apr. 2002), sum eftir valið í 2002 varð víðkað við Miðflokkinum (Juni 2002 - Des. 2003). Í hvønn mun komandi samgongan fer at arbeða víðari eftir hesum leisti er óvíst.

Síðan hetta hevur fólkaatkvøða verið í Runavíkar og Skála kommunu – 8. oktober 2001 – har stórur meiriluti var fyri at leggja saman, soleiðis at talan verður um 1 kommunu við/eftir kommunuvalið í 2004.

| Fólkaatkvøða í Runavíkar og Skála kommunum 8. Okt. 2001 | | | |
|---|---|---|---|
| | Ja % | Nei % | Atkvøður |
| Runavík | 78,9% | 21,1% | 951 |
| Skála | 85,2% | 14,8% | 391 |
| *Valluttøka 55.6 % í Runavík og 79,5 % í Skála* | | | |

Tann 6. mai 2003 var fólkaatkvøða í sjey kommunum í og nærhendis Sundalagnum. Hesar hava allar (undantikið Saksunar kommuna) verið partur av Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, ið er tað mest umfatandi kommunalum samstarvi millum grannakommunur í Føroyum. Á fólkaatkvøðuni var greiður meiriluti fyri samanlegging í seks av kommununum – Gjáar-, Haldórsvíkar-, Hvalvíkar-, Saksunar-, Sunda, og Tjørnuvíkar kommuna – ið sostatt leggja saman í 1 kommunu, sum verður nevnd Sunda Kommuna.

| Fólkaatkvøða í kommunum kring Sundalagið 6. Mai 2003 | | | |
|---|---|---|---|
| | Ja % | Nei % | Atkvøður |
| Gjáar | 66,7% | 33,3% | 36 |
| Haldórsvíkar | 88,0% | 12,0% | 108 |
| Hósvíkar | 46,7% | 53,3% | 152 |
| Hvalvíkar | 64,6% | 35,4% | 189 |
| Saksunar | 88,9% | 11,1% | 18 |
| Sunda | 63,3% | 36,7% | 245 |
| Tjørnuvíkar | 95,0% | 5,0% | 40 |
| *Tilsamans* | *66,1%* | *33,9%* | *788* |

Tað hevur ofta verið ført fram, at mótstøðan móti kommunusamanlegging er størst í smáu kommununum m.a. tí íbúgvarnir har eru bangnir fyri at blíva burtur í einari størri kommunu soleiðis, at teirra áhugamál ikki verða røkt. Í hesum sambandi er tað áhugavert at sera stórur meiriluti var fyri samanlegging í tveimum av teimum smæstu kommununum Tjørnuvík (95 %) og Saksun (89 %).

Á fólkaatkvøðuni í mai 2003 var ikki meiriluti í Hósvíkar fyri at gerast partur av Sunda kommunu. Men í september 2003 varð nýggj fólkaatkvøða hildin í Hósvík, og gjørdist úrslitið tá, at 51 % (88 atkvøður) vóru fyri kommunusamanlegging og 49 % (83 atkvøður) ímóti.

| Fólkaatkvøða í Kirkjubøar kommunu 24. Mai 2003 | | | |
|---|---|---|---|
| | Ja % | Nei % | Atkvøður |
| | 61,6% | 38,4% | 138 |
| *Valluttøka 95,8 %* | | | |

Tann 24. mai 2003 var eisini fólkaatkvøða í Kirkjubøar kommunu, har veljarin skuldi gera av, um Kirkjubøar kommunu skuldi leggja saman við Tórshavnar kommunu. Greiður meiriluti var fyri hesum, og við/eftir kommunuvalið í 2004 fer Kirkjubøar kommuna uppí Tórshavnar kommunu.

| Fólkaatkvøða í Oyndafjarðar kommunu 18. Nov. 2003 | | | |
|---|---|---|---|
| | Ja % | Nei % | Atkvøður |
| | 72,7% | 27,3% | 110 |
| *Valluttøka 81,0 %* | | | |

Í november 2003 skuldu oyndfirðingar eisini taka støðu til, um Oyndarfjarðar kommuna skuldi leggja saman við aðrari kommunu, og í øðrum lagi, um kommunan skuldi leggja saman við Fuglafjarðar ella Runavíkar kommunu. Úrslitið av fyrru fólkaatkvøðuni var, at oyndfirðingar vildu leggja saman við aðrari kommunu, og við fólkaatkvøðuna 25. nov. 2003 varð gjørt av, at Oyndarfjarðar kommuna fer uppí Runavíkar kommunu.

Tað nýggjasta er, at nólsoyingar í november 2003 hava avgjørt at fara undir samráðingar við Tórshavnar kommunu, fyri at fáa greiði á, hvørt Nólsoyar kommuna eisini skal fara uppí Tórshavnar kommunu.

Sum er hava fólkaatkvøðurnar í teimum 11 kommununum ført við sær, at talið av kommunum í Føroyum minkar úr 49 kommunum (áðrenn kommunuvalið í 2000), niður í 40 kommunur (við kommunuvalið í 2004). Áhugavert er, at bara í 2003 hava fleiri kommunur avgjørt at leggja saman enn í allari 20 øld!

## Kommunurnar í Suðuroynni

Í Suðuroynni eru sjey kommunur, sum eru rættliga ymiskar, hvat viðvíkur fólkatali, aldurs- og kynsbýti, skattskyldugari inntøku, og skuld. Hesi viðurskifti kunnu hava ávirkan á, í hvønn mun borgarar í teirri einstøku kommununum í oynni hava áhugað í, at

teirra kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu. Eins og hesi viðurskifti eisini verða við til at leggja trýst á tað einstaka kommunustýri í samband við veitingar av tænastum til borgaran.




*Kort 1. Kommunurnar í Suðuroynni (www.cre8.fo)*

**Fólkatal við árslok 2002**

| Kommunur | Fólkatal |
|---|---|
| Tvøroyarar | 1.867 |
| Vágs | 1.452 |
| Hvalbiar | 767 |
| Sumbiar | 431 |
| Porkeris | 373 |
| Hovs | 133 |
| Fámjins | 111 |
| **Tilsamans** | **5.134** |

(Hagstova Føroya, 2003)

### Fólkatal, aldurs- og kynsbýtið

Størsta kommuna í Suðuroynni er Tvøroyrar kommuna, har 1.867 fólk búðu við árslok í 2002. Tann minsta kommunan var við árslok 2002 Fámjins kommuna, sum tá hevði 111 íbúgvar.

Ein trupulleiki í Suðuroyggin er aldur- og kynsbýtið, hetta serliga, tá samanborið verður við býtið í Føroyum sum heild. Har eru rættliga stór frávik, serliga á tann hátt, at tað eru lutfalsliga fleiri eldri suðringar, enn tað eru í Føroyum sum heild – og lutfalsliga færri yngri fólk í Suðuroynni, samanborið við í Føroyum sum heild. Eisini eru munandi fleiri mannfólk enn konufólk í Suðuroynni. Eitt skeivt aldurs- og kynsbýti eru vanlig eyðkenni fyri lokalsamfeløg, ið hava trupulleikar at dragast við.

Aldurs- og kynsbýti í kommununum í Suðuroynni (sí fylgiskjal 1), er tó rættliga líkt í teimum einstøku kommunum, hóast nøkur frávik eru. Til dømis eru tað í teimum smærri kommununum lutfalsliga fleiri fólk, sum eru 60 ár og eldri, enn tað eru í teimum størri

kommununum, Tvøroyrar og Vágs kommunum. Av øðrum frávikum frá heildarmyndini í oynni, kann sigast, at tað til dømis eru lutfalsliga væl fleiri dreingir í aldurbólkinum 19 ár óg yngri í Hvalbiar kommunu, enn tað eru gentur. Í Sumbiar kommunu er støðan hin øvugta, har eru tað lutfalsliga fleiri gentur enn dreingir í hesum aldursbólkinum.

Aldurs- og kynsbýtið í teirri einstøku kommununi hevur týdning í samband við spurningin um kommunalar uppgávur og kommunusamanlegging. Hetta ávirkar, hvussu stóra fíggjarliga orku tann einstaka kommunan má brúka fyri at veita nøktandi tænastur á teimum ymiskum økjum. Hetta er eitt nú verða galdandi fyri eldraøkið, sum ætlanir hava verið frammi um at leggja út til kommunurnar at umsita. Í hesum sambandi er væntandi, at kommunur við lutfalsligum nógvum eldri fólkum, mugu brúka lutfalsliga stóra fíggjarliga orku uppá tænastur innan eldrarøkt[3]. Júst hetta kann ávirkað, í hvønn mun kommunustýrið er fyri ella ímóti kommunusamanlegging.

### Skattskyldug inntøka og kommunuskuld

Skattskylduga inntøkan í kommununum í Suðuroynni í 2001 var rættliga lík, tá samanborið verður millum kommunurnar í oynni. Men um samanborið verður við hinar kommurnar í landinum og við miðaltalið fyri kommunurnar, so eru kommunurnar í Suðuroynni í lægra endanum, hvat skattskyldugari inntøku viðvíkur. Sí eisini fylgiskjal 2. Skattskylduga inntøkan gevur eina mynd av, hvussu stórt virksemi hevur verið í økinum, og er myndin greið – virksemi í Suðuroynni hevur verið nakað minni enn aðrastaðni í landinum.

Fíggjarstøðan hjá kommununum í Suðuroynni er rættliga ymisk. Í áttati- og nítiárunum uppbygdu Tvøroyrar og Vágs kommunur stóra skuld, og hetta var partvíst eisini galdandi fyri Hovs og Porkeris kommunur. Fámjins, Hvalbiar og Sumbiar kommunur hava hinvegin verið rættliga væl fyri fíggjarliga, tó at fíggjarstøðan hjá Sumbiar kommunu er broytt við út- og nýbyggingini av Sumbiar skúla og kommunuskrivstovuni í Sumba. Munurin á fíggjarstøðuni hjá kommununum er eisini ein orsøki til, at

[3] Hetta verður tó alt eftir í hvønn mun ein útlíkningarskipan verður gjørd, soleiðis at kommunur við t.d. lutfalsliga nógvum eldri fólkum, ikki verða raktar ov hart fíggjarliga.

kommunuskattaprosentið fyri kommunurnar í oynni er so ymiskt – í 2002 lægst í Fámjin (16,30 %) og hægst á Tvøroyri (22,80 % íroknað kirkjuskatt).

| Útvald fíggjar- og kommunuskatta hagtøl 2002 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fíggjarogn | Fíggjarogn pr. fólk | Lániskuld | Lániskuld pr. fólk | Ogn - skuld | Ogn - skuld pr. fólk | Skatta %* | Barna-frádráttur |
| Hvalbiar | 11.962.692 | 15.597 | 12.652.242 | 16.496 | -689.550 | -899 | 19,30 | 3.000 |
| Tvøroyarar | 8.846.832 | 4.739 | 97.526.765 | 52.237 | -88.679.933 | -47.499 | 22,80 | 3.000 |
| Fámjins | 3.187.004 | 28.712 | 607.665 | 5.475 | 2.579.339 | +23.237 | 16,30 | 5.000 |
| Hovs | 1.479.714 | 11.126 | 4.735.141 | 35.603 | -3.255.427 | -24.477 | 21,30 | 3.000 |
| Porkeris | 1.950.702 | 5.230 | 10.231.316 | 27.430 | -8.280.614 | -22.200 | 21,30 | 3.000 |
| Vágs | 7.170.263 | 4.938 | 60.439.371 | 41.625 | -53.269.108 | -36.687 | 22,05 | 2.500 |
| Sumbiar | 2.588.568 | 6.006 | 3.952.966 | 9.172 | -1.364.398 | -3.166 | 18,30 | 4.000 |
| *Suðuroy* | *37.185.775* | *7.243* | *190.145.466* | *37.037* | *-152.959.697* | *-29.794* | | |

* Íroknað kirkjuskattaprosent.

Hagstova Føroya, 2003 og Innanríkisdeildin á Løgmálaráðnum, Okt. 2003 (persónligt samskifti)

Stóri munurin á nettoskuldini í teirri einstaku kommuni í Suðuroynni kann hava við sær, at fólk í teimum ”ríkari” kommununum eru ímóti, at teirra kommuna leggur saman við einari skuldarbundnari kommunu. Um kommunurnar í Suðuroynni leggja saman í 1. komunu, er tað hugsandi, at bæði skattaprosent og barnafrádráttur hjá teimum ”ríkari” kommunum verður tillaga miðal fyri oynna. Fyri tann einstaka borgaran í teimum ”ríkari” kommunum merkir hetta, at tað verður dýrari at verða borgar í teirri samanløgdu kommuni enn tað er í verandi kommunu. Á hendan hátt er fíggjarstøðan hjá kommununum í Suðuroynni eisini við til at ávirkað hvør hugsan suðringa er um kommunusamanlegging.

## *Kommunusamanlegging í Suðuroynni*

Eins og aðrastaðni í landinum, so hevur spurningurin um kommunusamanlegging eisini verið umrøddur í Suðuroynni. Evnið er javnan á munni millum manna og eisini í lesarabrøvum verður spurningurin umrøddur. Tvøroyrar kommuna hevur eisini sent bræv til allar borgarar yvir 18 ár og spurt um tey eru fyri kommunusamanlegging.

Í oktober 2003 varð eisini skipað fyri einum pallborðsfundi í Øravík[4], har umboð fyri kommunurnar í oynni kjakaðust um spurningin um kommunusamanlegging. Trupult er at gera nakrar greiðar niðurstøður frá slíkum fundi, men nógvir áhoyrarar vístu á, at ein kommunusamanlegging, har Suðuroyggin gerst 1 kommuna, var einasta rætta loysnin. Umboðini fyri kommunurnar vóru rættliga ymisk á máli. Eingin teirra tóktist vera beinleiðis eldhugaður fyri eini kommunusamanlegging. Tvørturímóti vildu teir helst, at teirra kommuna skal vera sjálvstøðug sum longst. Men hóast hetta so vístu fleiri teirra á, at tað kann gerast neyðugt við samanlegging í framtíðini m.a. orsakað av, at fleiri málsøkini vera løgd til kommunurnar.

Tær kommunur, sum hava umrøtt spurningin um kommunusamanlegging, hava flest allar víst á, at *um so er*, at ein kommunusamanlegging skal fremjast í Suðuroynni, so er frægast, um Suðuroyggin verður 1 kommuna. Vágs kommuna hevur tó samtykt, at um nøkur kommunusamanlegging verður gjørd í Suðuroynni, so skulu 2 kommunur vera í oynni – 1 kommuna í norðaru helvt og 1 kommuna í sunnaru helvt. Sum er, sær tað ikki út til, at hinar kommunurnar í oynni halda, at tvær kommunur í Suðuroynni er rætta loysnin (Lions Blaðið 2003).

Tá umboðini fyri kommunurnar verða brúkt sum barometur fyri, hvør støðan er til kommunusamanlegging í Suðuroynni, so er talan helst um eina rættliga fastlæsta støðu. Men gongdin aðrastaðni í landinum hevur víst, at støðan kann broytast rættliga skjótt. Endamálið við hesari kanningini, er at hyggja eitt sindur neyvari eftir, hvat suðringar sum heild meina um spurningin um kommunusamanlegging.

---

[4] Suðuroyar Tjóðveldisfelag skipaði fyri fundinum, ið varð skipaður soleiðis, at Hilmar Høgenni, deildarleiðari á Innanríkisdeildini í Løgmálaráðnum legði fyri. Eftir hetta varð pallborð skipað við umboðum fyri Tvøroyrar, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur. Fámjins og Hvalbiar kommunur vóru ikki umboðaðar á fundinum. Borgarstjórarnir í Hvalba og Fámjin hava tó eftir fundin alment sagt teirra meining viðvíkjandi kommunusamanlegging.

## Hvat halda suðringar um kommunusamanlegging?

Í november 2003 varð gjørd ein kanning av, hvat suðringar halda um kommunusamanlegging. Kanningin gevur nakrar greiðar ábendingar um, hvat veljarin í Suðuroynni heldur um kommunusamanlegging. Og er tað eisini rættiliga áhugavert, at kanningin gevur eina ábending um, at ein meiriluti av borgarunum í oynni ikki hava somu áskoðan sum kommunustýrislimirnar í oynni.

**Um kanningina**
Eftir áheitan frá Lions Club Suðuroy, varð gjørd ein kanning av hvat suðringar halda um kommunusamanlegging. Kanningin varð gjørd tann 19. november 2003, tá næmingar úr 2. flokki á Miðnámsskúlanum í Suðuroy ringdu til tilvildarligar útvaldar suðringar yvir 18 ár. Tilsamans svaraðu 502 suðringar umvegis telefonini spurnarblaðnum.

Kanningin er sum so rímuliga sterk, tá tosað verður um úrslit galdandi fyri alla Suðuroynna. Men tá úrslitini verða býtt eftir kommunum, eru ávísir veikleikar – hetta serliga galdandi fyri úrslitini í teimum smærri kommunununum í oynni. Hetta kemst av, at talið fólkum úr hesum kommunum sum hava svarað er so mikið lágt, at hagfrøðiliga óvissan er rættiliga stór.

Lagt eigur at verða til merkis, at tá talan er um eina veljarakanning sum hesa, er einans í ávísan mun talan um eina forsøgn um valúrslit. Hinvegin er talan um eina støðumynd (við ávísum veikleikum) av, hvørjar hugsanir, suðringar hava um kommunusamanlegging. Talan er ikki um eitt val, har fólk ella bólkar av fólki hava ført valstríð og roynt at ávirka veljaraskaran. Harumframt eigur eisini at verða hava havt í huga, at svarið hjá tí einstaka í eini veljarakanning ikki fær nakrar fylgjur, og er svarið/valið tí kanska ikki eins væl umhugsað og við eitt veruligt val.

### *Ja til kommunusamanlegging*

490 av teimum 502 sum luttóku í kanningini svaraðu uppá spurningin um teirra kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu. Ein stórur meiriluti av hesum – heili 73,9 % - svaraðu ja, at tey hildu, at teirra kommuna eigur at leggja saman við eini aðrari kommunu. 15,5 % svaraðu nei, at teirra kommuna skuldi ikki taka lut í eini kommunusamanlegging, meðan 10,6 % søgdu seg ikki vita. Sí eisini mynd 1.

Ein av orsøkunum til, at fleiri nú ynskja eina kommunusamanleggi ng framda í Suðuroynni, kann verða, at kommunusamanleggi ngar aðrastaðni í landinum hava ávirkað, hvat suðringar meina um hendan spurning.




*Mynd 1. Stórur meiriluti av teimum, sum hava luttikið í kanningini, eru fyri kommunusamanlegging.*

### *Meiriluti í øllum kommununum*

Um hugt verður at hvussu fólk í teimum einstøku kommununum hava svarað, so er ein greiður meiriluti fyri kommunusamanlegging í øllum kommununum í oynni. Serliga í Tvøroyrar kommunu eru borgararnir positivir um eina kommunusamanlegging – har eru heili 82 % fyri eini kommunusamanlegging. Í Vágs kommunu eru út við 70 % fyri eini kommunusamanlegging, og eru tølini fyri tær smærri kommunurnar nøkulunda tey somu. Í Hvalbiar kommunu, har stuðulin til eina kommunusamanlegging var minstur, søgdu umleið 60 % seg vera fyri eini kommunusamanlegging.

### *Flest ynskja 1. kommunu í Suðuroy*

Ein týðandi spurningur í kjakinum um kommunusamanlegging í Suðuroynni er spurningurin um, hvussu nógvar kommunu skulu verða í oynni. Kanningin vísti, at millum tey, ið halda at kommunurnar skulu leggja saman, var meiriluti fyri, at tær løgdu saman til 1 kommunu, sí eisini mynd 2. Umleið 57 % hildu, at ein kommuna skal vera í Suðuroynni, meðan um 40 % hildu, at tvær kommunur skulu verða í oynni.




*Mynd 2. Av teimum, sum eru fyri kommunusamanlegging, sigur meirilutin, at 1. kommuna skal vera í Suðuroynni*

Um hugt verður at, hvat fólk í teimum ymisku kommun-unum siga, gerst greitt, at ikki í øllum kommunum er meiriluti fyri at Suðuroyggin skal vera 1 kommuna. Í Vágs kommunu siga fleiri enn 50 % av teimum sum vilja kommunusamanlegging, at tað skulu verða 2 kommunur í oynni, meðan út við 40 % meina, at Suðuroyggin skal skipast í 1 kommunu. Í Sumbiar kommunu stendur á jøvnum millum tey, sum siga tað skal vera 1 kommuna, og tey, sum siga at tað skulu vera 2 kommunur í Suðuroynni. Í hinum kommununum í oynni er tað, millum tey sum vilja kommunusamanlegging, ein meiriluti fyri at Suðuroyggin gerst 1 kommuna.

Hóast ein meiriluti av teimum sum ynskja kommunusamanlegging, halda, at Suðuroyggin skal gerast 1 kommuna, so merkir hetta ikki neyðturviliga, at tað millum allar suðringar er meiriluti fyri at Suðuroyggin skal gerast 1 kommuna. Orsøkin til hetta er, at tey, sum eru ímóti kommunusamanlegging, ikki hava svarað spurninginum um, hvussu nógvar kommunur skulu verða í Suðuroynni.

### *Kommunur skulu leggjast saman skjótast tilber*

Stórur meiriluti er fyri kommunusamanlegging í Suðuroynni. Og nógv – um 49 % – av teimum, sum vilja kommunusamanlegging, halda, at hetta skal fara fram so skjótt sum til ber, meðan ein góður triðingum heldur, at rættast er, at kommunusamanleggingin fer fram eftir kommunuvalið í 2008 ella seinni. Góð 17 % siga seg ikki vita, nær kommunurnar skulu leggja saman.




*Mynd 3. Av teimum, sum eru fyri kommunusamanlegging, meina nógv, at kommunusamanleggingin skal fara fram sum skjótast.*

### *Kommunala fyrisitingin í Hovi?*

Tá kjakast verður um kommunusamanlegging gerst spurningurin um hvar kommunala fyrisitingin skal verða ofta týðandi – bæði fyri tey stóru og tey smærru plássini. Hetta hevur verið galdandi í samband við kommunusamanleggingar í Íslandi (Eyþtórsson, 1998) eins væl og í Danmark, seinast í samband við kommunusamanleggingina á Bornholm í 2003 (Kjær, 2002). Tað er eisini greitt, at avgerðin um, hvar kommunala fyrisitingin skal vera, kann gerast eitt av stríðsmálunum, ið fer at gera kommunu-samanleggingar í Suðuroynni truplar. Ført hevur verið fram,




*Mynd 4. Av teimum, sum eru fyri kommunusamanlegging, siga flest, at kommunuskrivstovan skal vera í Hovi.*

at um øll Suðuroyggin bleiv 1 kommuna, kundi ein loysn á hesum trupulleika verið, at kommunala fyrisitingin fyri alla oynna bleiv løgd í Hovi. Tá tunnilin millum Øravík og Hov verður liðugur er tað lutfalsliga stutt og lætt hjá øllum suðringum at koma til Hovs.

Í spurnarkanningini blivu tey, sum ynsktu kommunusamanlegging spurd, hvar tey hildu, at kommunala fyrisitingin skal verða. 40 % svaraðu at kommunuskrivstovan átti at verið í Hovi og var hetta tann svar-møguleikin, sum hevði nógv best undirtøku millum suðringar. 13 % hildu at skrivstovan skuldi vera á Tvøroyri, meðan tað eisini vóru 13 % sum hildu, at hon átti at vera í Vági.

Viðmerkjast skal, at hóast flest hildu at kommunuskrivstovan í ”Suðuroyar” kommunu eigur at vera í Hovi, so var stórur munur á, hvussu nógv í einstøku kommununum hildu hetta. Undirtøkan fyri at hava kommunuskrivstovuna í Hovi var minst í Vági.

Tey 10 %, sum svaraðu, at kommunuskrivstovan skuldi verða bæði á Tvøroyri og í Vági, hildu eisini, at tað skuldu verða 2 kommunur í Suðuroynni.

### *Stórar vónir til kommunusamanlegging*

Í samband við viðgerð av hvørjar fyrimunir kommunusamanlegging kann hava við sær, verður oftani ført fram, at kommunusamanlegging ger, at borgarin kann fáa betri kommunanalar tænastur og eina betri og effektivari umsiting.

Eisini í kjakinum í Føroyum hava hesar grundgevingar verið frammi í samband við spurningin um kommunusamanlegging. Umframt hetta, so hevur tað í Suðuroynni eisini verið frammi, at ein kommunusamanlegging kann føra við sær, at suðringar fara at standa sterkari út-at-til. Orsøkin til at hetta er partur av kjakinum er, at nógvir suðringar halda, at tað er ein vansi fyri oynna, at ymsar útmeldingar um týdningarmikil viðurskifti ofta koma frá umboðum úr oynni.

Stór semja var millum suðringar um, at ein kommunusamanlegging vildi hava við sær, at Suðuroyggin fór at standa í einari sterkari støðu mótvegis restina av Føroyum. Heili

96 % av teimum, sum vóru fyri kommunusamanlegging – og fleiri enn 75% av teimum, sum vóru ímóti kommunusamanlegging – vóru samd í hesum. Tað vóru eisini heilt nógv sum hildu, at ein fyrimunur við at leggja kommunur saman var, at samanhaldi millum bygdirnar í Suðuroynni vildi gerast betri. Men tá tað kemur til onnur viðurskiftini, so eru tey sum eru ávíkavist fyri og ímóti rættliga ósamd viðvíkjandi hvat ein kommunusamanlegging fer at hava við sær.

Tey, ið eru fyri kommunusamanlegging hava sera stórar vónir til, at ein kommunusamanlegging fer at hava eina røð av fyrimunum við sær. Tey hildu næstan øll, at ein samanlegging - antin í stóran ella avísan mun - vil hava sær, at Suðuroyggin fer at standa sterkari út-at-til (96 %), at samanhaldi millum bygdirnar í oynni verður betri (88 %), at borgarin fær betri kommunalar tænastur (84 %), og at kommunala umsitingin vildi verið betri og effektivari (83 %), um Suðuroyggin verður 1. kommuna. Sí eisini mynd 5. niðanfyri.




*Mynd 5. Tey, sum eru fyri kommunusamanlegging: Í hvønn mun ert tú samd/-ur í, at kommunusamanlegging førir við sær...?*

### *Hví eru fólk ímóti kommunusamanlegging?*

Sum nevnt vóru 15,5 % av teimum, sum luttóku í kanningini, ímóti eini kommunusamanlegging. Men meðan tey sum eru fyri kommunusamanlegging tykkjast at sannførd um, at samanlegging fer at hava nógvar positivar fylgur fyri Suðuroynna, so eru tey, sum eru ímóti, sum vera mann, munandi meiri ivandi í mun til, hvørt kommunusamanlegging fer at hava hesar fyrimunirnar við sær. Sí eisini mynd 6.




*Mynd 6. Tey, sum eru ímóti kommunusamanlegging: Í hvønn mun ert tú samd/-ur í, at kommunusamanlegging førir við sær...?*

Sum nevnt so eru tað nógv - tríggir fjórðingar - av teimum, sum eru ímóti kommunusamanlegging, ið halda at samanlegging fer at hava við sær, at Suðuroyggin fer at standa sterkari úteftir. Hinvegin eru tað bara 40 % av teimum, sum eru ímóti samanlegging, ið halda at samanhaldi millum bygdirnar verður betri av einari samanlegging, meðan næstan helvtin av teimum, sum eru ímóti halda, at hetta ikki verður úrslitið í samband við eina kommunusamanlegging.

Tey, ið eru ímóti kommunusamanlegging, væntað sum heild ikki, at kommunu-samanlegging fer at hava við sær betri kommunalar tænastur. Og bert fá teirra væntað, at samanlegging fer at hava við sær betri og effektivari umsiting.

Tað er vert at leggja til merkis, at ein ávísur bólkur av teimum, sum eru imóti kommunusamanlegging, sum (hóast tey eru ímóti) vænta, at ein samanlegging kann

hava nakrar fyrimunir við sær. Fyri at koma nærri einum svari uppá hvat ger, at fólk ikki halda tað vera rætt og gagnligt at leggja kommununar saman, blivu tey spurd um, hví tey vóru ímóti kommunusamanlegging .

Omanfyri varð víst á, at fíggjarstøðan hjá ymsu kommunum í Suðuroynni er rættiliga ymisk. Í kjakinum um kommunusamanlegging í Suðuroynni hevur ofta verið víst á, at stóra kommunuskuldin hjá Tvøroyrar og Vágs kommunu er ein forðing fyri kommunusamanlegging, tí hetta vil ávirka búskaparstøðuna í flestu av hinum kommununum skeiva vegin. Ein onnur vanlig grundgeving fyri mótstøðuni ímóti kommunusamanlegging er, at tær smærri kommunurnar / bygdirnar óttast fyri at missa ávirkan í eini størri kommunu[5]. Somuleiðis hevur verið víst á, at mótstøðan er grundað á eitt ynski um at varðveita kommunalu umsitingina í bygdini[6].

Í kanningini varð spurt um hesi viðurskifti – og vísir kanningin, at fleiri enn helvtin av teimum, sum vóru ímóti kommunusamanlegging, søgdu hetta verða orsaka av, at ein kommunusamanlegging hevði ávirkað búskaparstøðuna í teirra kommunu skeiva vegin. Fleiri enn 60 % søgdu, at mótstøðan varð grundað á, at tey ikki vildu missa kommunalu umsitingina úr bygdini/býnum. Meðan fleiri enn 55 % søgdu, at mótstøðan mótvegis kommunusamanlegging varð orsaka av óttanum fyri at missa ávirkan í einari størri kommunu. Sí eisini mynd 7. niðanfyri.

---

[5] Ásannandi hesar trupulleikar er tað í føroysku lóggávuni um kommunusamanlegging eisini givin møguleiki fyri at seta á stovn staðbundnar nevndir í einstøku bygdunum í teirri samanlagdu kommuni. Staðbundnu nevndirnar verða valdar, tá kommunuval er. Staðbundnu nevndirnar skulu hoyrast í samband við at uppgávur verða loystar ella tiltøk sett ígongd í teirri einstaku bygdini í eini samanlagdari kommunu. Hetta er t.d. støðan í Kollafjørði, har ein staðbundin nevnd er komin ístaðin fyri Kollafjarðar kommunustýrið.

[6] Spurningurin um hvar kommunuskrivstovan skal vera, tá kommunur leggja saman hevur eisini verið nógv frammi í t.d. Íslandi og Danmark, t.d. í smb. Kommunusamanleggingina á Bornholm. Í Íslandi eru dømi um at høvuðsskrivstovan er løgd í størstu bygdini, meðan umsiting annars er spjødd millum bygdirnar. Har fleiri stórar bygdir hava lagt saman er sjálv høvuðsumsitingin spjadd. (Tíðindabrævið Hugin&Munin, Nr.1 2002).




*Mynd 7. Hvørjar eru orsøkirnar til mótstøðuna til kommunusamanlegging.*

## Hvat vænta tey?

Eitt er hvat suðringar væntað at ein samanleggin fer at hava við sær, men roknað tey yvirhøvur við, at nøkur samanlegging verður? Í kanningini varð spurt, hvussu nógvar kommunur tey vænta vera í Suðuroynni í 2020. Út við helvtin svaraðu, at tey væntaðu, at Suðuroyggin verður 1 kommuna, meðan smá 30 % væntaðu, at 2 kommunur verður í oynni. Heilt fá, færri enn 5 %, vænta, at talið av kommunu verður tað sama sum í dag. Sostatt eru tað næstan øll sum rokna við at broytingar í kommunuviðurskiftunum fara at henda í Suðuroynni komandi árini. Spurningurin er so um nakar fer at taka stig til, at broytingar henda

## Ynskja økt samstarv

Kommunalt samstarv verður ofta ført fram sum ein onnur loysn enn kommunusamanlegging, sum eisini kann viga upp fyri teimum trupulleikum, ið smáar kommunur kunnu hava við at bjóða sínum borgarum neyðugu tænasturnar og uppfylla tær skyldur kommunurnar hava sambært lóg (Holm og Mortensen, 2002; Lundtorp og Weber, 2001). Umfatandi samstarv er longu í dag millum kommunurnar í Suðuroynni um t.d. heilsumál, brunamál, eldraøkið og ferðavinnu. Men um ikki kommunur leggja saman, so verður tað helst tørvur á, at samstarv verður um fleiri av teimum umfatandi málsøkjum, sum væntandi verða flutt til kommunurnar at umsita í næstu framtíð.

Í kanningini bleiv spurt hvørt tey hildu, at kommunala samstarvið í oynni átti av verða økt um kommunurnar ikki leggja saman. Næstan 90 % av teimum spurdu hildu, at samstarvið millum kommunurnar eigur at økjast. So hóast umfatandi samstarv longu er millum kommunurnar í Suðuroynni, so vísir kanningin tó greitt, at suðringar halda, at kommunurnar eiga at samstarva á enn fleiri økjum.

### *Status quo, kommunusamanlegging ella økt samstarv?*

Hendan kanningin vísir, at ein meiriluti av suðringum ynskja kommunusamanlegging, hóast hetta er tað ikki nógv sum týðir uppá, at nøkur kommunusamanlegging verður í Suðuroynni í næstu framtíð. Øll umboðini fyri kommunurnar í oynni, sum hava úttalað seg, vísa á, at tær einstøku kommunurnar ynskja at klára seg sum sjálvstøðugar kommunur sum longst. Tó vísa umboðini á, at tað kann gerast neyðugt, at kommunur leggja saman, men enn hevur ongin teirra víst tekin um, at tey vilja taka stig til at nakað ítøkiligt skal henda, hvat kommunusamanlegging viðvíkur.

Kjakið um kommunusamanlegging í Suðuroynni hevur oftani snúð seg um, hvat Tvøroyrar og Vágs kommunur halda. Men í veruleikanum, so er tað tær smáu kommunurnar, sum hava avgerðandi orðið í spurninginum um kommunusamanlegging í Suðuroynni. Hvørt Tvøroyrar og Vágs kommunur ynskja 1 ella 2 kommunur er ikki tað einasta, sum hevur týdning. Tær smáu kommunurnar koma í sama mun at avgera hendan spurning. Um ein kommuna í oynni ikki ynskir kommunusamanlegging, so verður Suðuroyggin ikki 1 kommuna.

Sambært útsøgnum frá umboðum fyri kommunurnar í Suðuroynni, so verður ongin kommunusamanlegging í oynni fyribils – og verður talið av kommunum í oynni, tí helst tað sama í komandi árum. Men hendan kanningin av hvat suðringar halda um kommunusamanlegging gevur tó greiðar ábendingar um, at nógv fólk eru í Suðuroynni, sum ynskja broytingar. Tað eru nógv, ið halda at kommunusamanlegging fer at hava fyrimunir við sær. Fyrst og fremst vænta næstan øll, at kommunusamanlegging fer at hava við sær, at oyggin fer at standa sterkari út-at-til, og at samanhaldi millum bygdirnar í oynni verður betri. Hetta kann tulkast sum, at nógvir suðringar eru troyttir

av tí bygdaklandrinum, sum eisini er ein partur av veruleikanum í Suðuroynni. Stórur partur av teimum sum stuðla kommunusamanlegginum vænta eisini, at samanlegging fer at hava við sær betri og effektivari kommunalar tænastur. Um 80 % halda antin, at kommunusamanlegging eigur at fara fram sum skjótast ella at tað skal vera við kommunuvalið í 2008. Tá tað kemur til spurningin um, hvar kommunuskrivstovan eigur, at vera var størst undirtøka fyri, at hon eigur at vera í Hovi.

Meiningarnar viðvíkjandi kommunusamanleggingar eru broyttar nógv seinnu árini. Og bæði politikarar og veljarar eru nú meiri positivir fyri at umrøða broytingar. Hóast hetta tykist tað ikki sum, at nakað ítøkiligt fer at henda viðvíkjandi kommunusamanlegging í Suðuroynni í nærmastu framtíð. Men gongdin aðrastaðni í Føroyum vísir, at hetta er nakað, sum kann broytast rættiliga skjótt – tíðin vil vísa, hvørt hetta eisini verður støðan í Suðuroynni.

## Bókmentir


| | |
|---|---|
| Eyþtórsson, Grétar Þór. 1998. | *Kommunueindelingspolitik i Island. Staten, kommunerne og folket om kommunesammanslagningar.* CEFOS, Gøteborg. |
| Fynd. 1999 | *Veljarakanning í mars 1999.* |
| Hagstova Føroya. 2003 | *Árbók fyri Føroyar 2003.* Hagstova Føroyar og Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn. |
| Holm, Dennis og Mortensen, Bjarni. 2002. | *Kommunalt samstarv – ein onnur loyns enn kommunusamanlegging?* Granskingardepilin fyri Økismenning, Klaksvík. |
| Holm, Dennis og Mortensen, Bjarni. Forthcoming 2004. | *A critical appraisal of local government planning – the case of Faeroe. In* Regional Development on the North Atlantic Margin: Selected Contributions to the Sixteenth International Seminar on Marginal Regions. Edited by: Reginald Byron and Tim Jenkins. |
| Hugin & Munin. 1/2002. | Tíðindabræv. Granskingardepilin fyri Økismenning. Klaksvík. |
| Kjær, Ulrik. 2002. | *Kommunesammenlægninger – og hvor skal rådhuset sp ligge? i* Nordisk Administrativt Tidskrift 1/2002, 83. Årgang. |
| Kommununevndin. 1998b. | *Nýggj kommunuskipan. Niðurstøða og tilmæli. Táttur II.* Tórshavn. Føroya Landsstýri |
| Lions Blaðið 2003. | *Lions Blaðið 2003.* Lions Club Suðuroy. |
| Lov om de færøske landkommuners styrelse. 1872. | *Lov nr. 30 fra 28. Feb. 1872 om de færøske landkommuners styrelse.* |
| Lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. 2001. | *Løgtingslóg nr. 77. frá 08.05.2001 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar.* |
| Svend Lundtorp og Michel Weber. 2001. | *Kommunalt samarbejde – Nu og i fremtiden.* Kommuneinformation, Kommunernes Landsforening. København |

# Fylgiskjal 1. Fólkatal, aldurs og kynsbýtið í Suðuroynni 2002

| Kommuna | | Fólkatal tils. | Upp í 19 ár | 20-39 ár | 40-59 ár | 60 ár o.e. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hvalbiar** | **Tils.** | **767** | **222** | **185** | **194** | **166** |
| | Kvinnur | 339 | 87 | 80 | 93 | 79 |
| | Menn | 428 | 135 | 105 | 101 | 87 |
| | **Tils.** | | 28,9% | 24,1% | 25,3% | 21,6% |
| | Kvinnur | 44,2% | 25,7% | 23,6% | 27,4% | 23,3% |
| | Menn | 55,8% | 31,5% | 24,5% | 23,6% | 20,3% |
| **Tvøroyrar** | **Tils.** | **1.867** | **518** | **444** | **537** | **368** |
| | Kvinnur | 910 | 268 | 192 | 251 | 199 |
| | Menn | 957 | 250 | 252 | 286 | 169 |
| | **Tils.** | | 27,7% | 23,8% | 28,8% | 19,7% |
| | Kvinnur | 48,7% | 29,5% | 21,1% | 27,6% | 21,9% |
| | Menn | 51,3% | 26,1% | 26,3% | 29,9% | 17,7% |
| **Fámjins** | **Tils.** | **111** | **23** | **29** | **29** | **30** |
| | Kvinnur | 48 | 11 | 11 | 13 | 13 |
| | Menn | 63 | 12 | 18 | 16 | 17 |
| | **Tils.** | | 20,7% | 26,1% | 26,1% | 27,0% |
| | Kvinnur | 43,2% | 22,9% | 22,9% | 27,1% | 27,1% |
| | Menn | 56,8% | 19,0% | 28,6% | 25,4% | 27,0% |
| **Hovs** | **Tils.** | **133** | **37** | **25** | **41** | **30** |
| | Kvinnur | 67 | 19 | 14 | 18 | 16 |
| | Menn | 66 | 18 | 11 | 23 | 14 |
| | **Tils.** | | 27,8% | 18,8% | 30,8% | 22,6% |
| | Kvinnur | 50,4% | 28,4% | 20,9% | 26,9% | 23,9% |
| | Menn | 49,6% | 27,3% | 16,7% | 34,8% | 21,2% |
| **Porkeris** | **Tils.** | **373** | **113** | **79** | **99** | **82** |
| | Kvinnur | 171 | 54 | 37 | 43 | 37 |
| | Menn | 202 | 59 | 42 | 56 | 45 |
| | **Tils.** | | 30,3% | 21,2% | 26,5% | 22,0% |
| | Kvinnur | 45,8% | 31,6% | 21,6% | 25,1% | 21,6% |
| | Menn | 54,2% | 29,2% | 20,8% | 27,7% | 22,3% |
| **Vágs** | **Tils.** | **1.452** | **383** | **395** | **388** | **286** |
| | Kvinnur | 700 | 189 | 176 | 191 | 144 |
| | Menn | 752 | 194 | 219 | 197 | 142 |
| | **Tils.** | | 26,4% | 27,2% | 26,7% | 19,7% |
| | Kvinnur | 48,2% | 27,0% | 25,1% | 27,3% | 20,6% |
| | Menn | 51,8% | 25,8% | 29,1% | 26,2% | 18,9% |
| **Sumbiar** | **Tils.** | **431** | **110** | **101** | **124** | **96** |
| | Kvinnur | 197 | 56 | 41 | 54 | 46 |
| | Menn | 234 | 54 | 60 | 70 | 50 |
| | **Tils.** | | 25,5% | 23,4% | 28,8% | 22,3% |
| | Kvinnur | 45,7% | 28,4% | 20,8% | 27,4% | 23,4% |
| | Menn | 54,3% | 23,1% | 25,6% | 29,9% | 21,4% |
| **Suðuroyggin** | **Tils.** | **5.134** | **1.406** | **1.258** | **1.412** | **1.058** |
| | Kvinnur | 2.432 | 684 | 551 | 663 | 534 |
| | Menn | 2.702 | 722 | 707 | 749 | 524 |
| | **Tils.** | | 27,4% | 24,5% | 27,5% | 20,6% |
| | Kvinnur | 47,4% | 28,1% | 22,7% | 27,3% | 22,0% |
| | Menn | 52,6% | 26,7% | 26,2% | 27,7% | 19,4% |
| **Føroyar** | **Tils.** | **47.704** | **14.625** | **12.576** | **12.056** | **8.447** |
| | Kvinnur | 22.953 | 7.100 | 5.701 | 5.697 | 4.455 |
| | Menn | 24.751 | 7.525 | 6.875 | 6.359 | 3.992 |
| | **Tils.** | | 30,7% | 26,4% | 25,3% | 17,7% |
| | Kvinnur | 48,1% | 30,9% | 24,8% | 24,8% | 19,4% |
| | | | | | | |

# Fylgiskjal 2. Skattskyldug inntøka í kommununum í 2001

| Skattskyldug inntøka í kommunum í 2001 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Kommuna | Skattgjaldarar í tali | Skattskyldug inntøka (í 1.000 kr.) | Skattskyldug inntøka pr. fólk |
| 1 | Fugloyar | 48 | 9.240 | 192,500 |
| 2 | Kunoyar | 118 | 20.914 | 177,237 |
| 3 | Gøtu | 831 | 146.735 | 176,576 |
| 4 | Tórshavnar | 15.641 | 2.737.793 | 175,040 |
| 5 | Sunda | 403 | 69.645 | 172,816 |
| 6 | Viðareiðis | 254 | 43.673 | 171,941 |
| 7 | Kvívíkar | 498 | 84.239 | 169,155 |
| 8 | Eiðis | 587 | 99.092 | 168,811 |
| 9 | Oyndarfj. | 139 | 22.519 | 162,007 |
| 10 | Leirvíkar | 738 | 119.183 | 161,495 |
| 11 | Hvalvíkar | 306 | 49.179 | 160,716 |
| 12 | Húsar | 45 | 7.223 | 160,511 |
| 13 | Hósvíkar | 215 | 34.257 | 159,335 |
| 14 | Kirkjubøar | 171 | 27.233 | 159,257 |
| 15 | Sørvágs | 773 | 122.321 | 158,242 |
| 16 | Nes | 1.004 | 158.036 | 157,406 |
| 17 | Fuglafj. | 1.378 | 213.281 | 154,776 |
| 18 | Klaksvíkar | 4.188 | 648.157 | 154,765 |
| 19 | Skála | 571 | 87.815 | 153,792 |
| 20 | Vestmanna | 1.061 | 162.639 | 153,288 |
| 21 | Bíggjar | 65 | 9.893 | 152,200 |
| 22 | Runavíkar | 2.172 | 330.551 | 152,187 |
| 23 | Miðvágs | 791 | 119.445 | 151,005 |
| 24 | Haldarsvík. | 226 | 33.991 | 150,403 |
| 25 | Sandavágs | 612 | 91.940 | 150,229 |
| 26 | Hvannas. | 375 | 56.138 | 149,701 |
| **27** | **Tvøroyrar** | **1.602** | **238.580** | **148,926** |
| 28 | Saksunar | 26 | 3.810 | 146,538 |
| 29 | Sjóvar | 857 | 125.206 | 146,098 |
| **30** | **Vágs** | **1.244** | **178.627** | **143,591** |
| 31 | Skopunar | 427 | 60.911 | 142,649 |
| 32 | Hests | 39 | 5.558 | 142,513 |
| **33** | **Fámjins** | **106** | **14.864** | **140,226** |
| **34** | **Hvalbiar** | **623** | **86.013** | **138,063** |
| **35** | **Porkeris** | **315** | **43.346** | **137,606** |
| 36 | Skálavíkar | 159 | 21.861 | 137,491 |
| 37 | Sands | 536 | 72.967 | 136,132 |
| **38** | **Hovs** | **106** | **14.410** | **135,943** |
| 39 | Funnings | 83 | 11.240 | 135,422 |
| 40 | Svínoyar | 59 | 7.987 | 135,373 |
| 41 | Nólsoyar | 230 | 30.725 | 133,587 |
| 42 | Gjáar | 59 | 7.525 | 127,542 |
| 43 | Húsavíkar | 133 | 16.888 | 126,977 |
| **44** | **Sumbiar** | **383** | **48.558** | **126,783** |
| 45 | Elduvíkar | 91 | 11.465 | 125,989 |
| 46 | Mykines | 15 | 1.717 | 114,467 |
| 47 | Mikladals | 60 | 6.777 | 112,950 |
| 48 | Skúvoyar | 68 | 7.614 | 111,971 |
| | **Miðal** | **40.431** | **6.521.781** | **161,306** |

Hagstova Føroya, 2003

# Fylgiskjal 3. Spurnarblað

## Spurnarblað í smb. við spurninginum um kommunusamanlegging í Suðuroynni

**1. Aldur:** ___________ ár

**2. Kyn:** ☐1 Kvinna ☐2 Maður

**3. Í hvørjari bygd býrt tú?** ☐1 Sandvík ☐2 Hvalba ☐3 Tvøroyri ☐4 Øravík ☐5 Fámjin ☐6 Hov ☐7 Porkeri ☐8 Vági ☐9 Akrar ☐10 Lopra ☐11 Sumba ☐12 Annað ________________

**4. Heldur tú, at tín kommuna skal leggja saman við eini aðrari kommunu?**

☐1 Ja ☐2 Nei (um nei far beinleiðis til sp. 7) ☐3 Veit ikki

**4a. Um ja,**

☐1 Skulu kommunurnar í Suðuroynni leggja saman til **1 kommunu**

☐2 Skulu kommunurnar í Suðuroynni leggja saman til **2 kommunur** (norður / suður)

☐3 Annað ________________ ☐4 Veit ikki

**4b. Um ja, nær skulu kommunurnar leggjast saman?**

☐1 Ongantíð ov skjótt (við kommunvalið 2004)

☐2 Við kommunuvalið í 2008

☐3 Seinni enn kommunuvalið 2008

☐4 Veit ikki

**5. Um kommunurnar leggja saman, hvar heldur tú at kommunala fyrisitingin (kommunuskrivstovan) skal verða?**

☐1 á Tvøroyri

☐2 í Vági

☐3 í Hovi

☐4 Annað ________________

☐5 Tað er líkamikið

☐6 Veit ikki

## Um nei til spurning 4. um kommunusamanlegging

Næstu spurningar eru um hvør orsøkin er til at tú er ímóti kommunusamanlegging. *Svarmøguleikarnir eru: Í stóran mun; Í ávísan mun, Í minni mun, Als ikki, Veit ikki.*

**6. Er orsøkin til at tú ert ímóti kommunusamanlegging grundað á,**

| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|
| a) ...at tykkara bygd / býur missur ávirkan í eini størri kommunu | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á) ...at tykkara kommunala umsiting flytir úr bygdini / býnum | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b) ...at tykkara búskaparstøða versnar, og skuldin og skattaprosentið hækkar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

## Øll skulu spyrjast hesar spurningar

Næsti spurningar eru um hvussu tú væntar ein kommunusamanlegging fer at ávirka ymisk viðurskifti. *Svarmøguleikarnir eru: Í stóran mun; Í ávísan mun, Í minni mun, Als ikki, Veit ikki.*

| **7. Í hvønn mun ert tú samd/-ur í, at kommunusamanlegging fer at føra við sær** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki |
| a) ...betri og effektivari umsiting | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á) ...betri kommunalar tænastur | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b) ...betri samanhald millum bygdirnar/býirnar í Suðuroynni | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| d) ...Suðuroyggin stendur sterkari út-at-til | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

**8. Um ongin kommunusamanlegging verður framd – eigur man so at økja samstarvið í oynni?**

| | |
|---|---|
| ☐1 Ja, samstarvið eigur at økjast | ☐3 Nei, hvør kommuna eigur at klára seg sjálvan |
| ☐2 Núverandi samstarv er nøktandi | ☐4 Veit ikki |

**9. Hvussu nógvar kommunur væntar tú eru í Suðuroynni í 2020**

| | | |
|---|---|---|
| ☐1 1 kommuna | ☐3 7 kommunur | ☐5 Veit ikki |
| ☐2 2 kommunur | ☐4 Annað _________________ | |

Takk fyri ómakin